gult14 cyan14 magenta14 svart14



# KÍ helt í 75 minuttir áðrenn tað skrædnaði

**Gøtumenn vóru leingi ikki sannførandi, men at enda eydnaðist teimum at taka luftina úr KÍ, sum síðsta korterið fór fullkomuliga í upploysn**

Tað er ikki av ongum, at GÍ heldur summarfrí við fullum stigatali. Tað varð aftur undirstrikað í Serpigerði í framúr góða summarveðrinum fríggjakvøldið.

Heimaliðið hevði trupulleikar at seta seg á mótstøðumenninar. GÍ var á ongan hátt niðurspælt fyrsta tíman, men teir megnaðu heldur ikki at skapa sær yvirvágina, sum so ofta fyrr á árinum hevur verið sjónsk.

Klaksvíkingar tóktust ikki vera komnir til Gøtu fyri at vera statistar, og tað vóru teir heldur ikki í meiri enn ein stóran tíma. Eftiransingarnar vóru tættar og avgjørdar, og tað tóktist skilagott av Tomislav Sivic, at hann hesa ferð royndi Allan Joensen í fremstu røð. Frammanundan hevði KÍ í fýra dystum bara megnað at skora tvey mál ímóti FS Vágum, og tí ráddi um at fáa tyngd í frammrættaða partin, og tað eydnaðist við liðformanninum, sum sjálvur megnar so sera nógv við bóltinum.

Longu í 12. minutti fingu klaksvíkingar møguleikan at seta hol á. Hjalgrím Elttør, sum hesa ferð var frammrættaður miðvallari í høgru, legði høga sending í brotsteigin, har ein av tryggu miðverjunum fór skeivur av bóltinum og brúkti armin. Dómarin segði brotsspark, og Alexander Djordjevic (tað sást væl, at hann ikki hevur fingið vant nakað serligt í fleiri vikur) trilladi eitt so mikið ússaligt skot úr ellviu metrum, at tryggi Hallur Hansen í GÍ málinum ikki hevði trupulleikar at tveita seg til høgru fyri seg sjálvan og taka bóltin niðri við stólparótina. KÍ hevur fingið fýra brotsspørk í landskappingini í ár, og hetta var triðja ferðin, at teir misnýttu.

### Betri grundspæl

Í málum, í mann ímóti manni og í málmøguleikum var leingi ikki stórur munur á liðunum. Gøtumenn arbeiddu ikki so nógv fyri hvørjum øðrum, sum teir plaga at gera, og miðvallararnir vóru ov seinir fram at stuðla seta væl upplagda og nógv arbeiðandi Helga L. Petersen og Óla Hansen.

Men hóast KÍ stríddist væl, og hóast annars trygga GÍ miðverjan onkra ferðina varð kroyst, so kendist tað sum um, at GÍ liðið var betri skipað. Tað var leingi lítið eksplosivt, men tað kendist sum um tað vóru størri møguleikar í heimaliðnum, har Henning Jarnskor enn eina ferð var sera sannførandi á vongverjanum, og har Zdzislaw Janik var skilagóður í vinstru, sjálvt um hann ikki tóktist arbeiða so nógv sum onkrir aðrir.

GÍ fekk hol á, tá seinna umfarið var trettan minuttir gamalt. Eftir horna og fleiri ferðir aftur og fram og út frá var KÍ verjuparturin óskipaður, tá innleggið kom úr høgru, og Helgi L. Petersen var púra leysur mitt fyri, tá hann heilfluktaði.

Tað restaði eitt korter, tá KÍ javnaði. Símun Joensen kroysti dygst uttanvert brotsteigin eitt fríspark burtur heimaliðnum. Og eftir eina so snilda frísparksdetalju, sum sjáldan sæst – hvørki á vølli í Føroyum ella í sjónvarpinum – var Allan Joensen púrar blankur, tá hann í málteiginum beindi bóltinum í kassan.

### Skrædlið

So tóktist spenningur vera komin í aftur, men tað gekk bara ein evarska lítil løta, so hevði GÍ lagt seg framum aftur. Tað er einki at liggja omaná, og tølini siga tað eisini, at eftir seinna leiðslumálið til GÍ var bara eitt lið á vøllinum. Klaksvíkingar vóru luftleysir statistar, meðan teir á heimaliðnum rættuliga fingu flogið. Nú var einki ófært hjá teimum, teir spældu KÍ sundur og saman, og í fleiri av støðunum, tá teir síðstu minuttirnar skoraðu, vóru fleiri spælarar leysir í brotsteiginum. Talan var rætt og slætt um sanna eyðmýking.

Zdzislaw Janik legði við framúr skoti úr 22 metrum GÍ framum 2–1. Bólturin fór sum ein pílur upp í málhornið. Tað var í 77. minutti, og tveir minuttir seinni var 3–1, tá Magni Jarnskor setti innaru síðu á flatt innlegg úr høgru. Í 89. minutti megnaði Meinhard Joensen, ið sjálvandi er merktur av, at málini hava skolað ígjøgnum hjá honum, bara at hálvbjarga fløtum frísparki frá Magna Jarnskor. Óli Hansen spældi við hælinum, og toppskjúttin, Helgi L. Petersen, var púra blankur mitt fyri málinum, tá hann skoraði.

Óli Hansen setti síðsta naglan í, og eyðmýkingin var fullkomin á allan hátt. Sum so ofta í 2. hálvleiki, so myndaðu gøtumenn álopið í høgru, og tríggir gulir og bláir vóru leysir í brotsteiginum, tá Óli varð spældur púra blankur.

Millum nógvu klaksvíkingarnar kring vøllin hoyrdust fleiri ætla sær til kappróður á Sundalagsstevnuni, og aðrir søgdu seg ivast í, um teir fóru á ólavsøku. Men nú fingu teir at síggja, hvussu tað fór at ganga, tá Kurt var komin!

Óneyðugt er at siga, at lagið hinumegin vøllin var í toppi – akkurát sum GÍ er tað á støðutalvuni og so var lag á manni at fara í brúdleyp hjá skadda liðformanninum, Sámali Joensen.



*GÍ er nakað heilt fyri seg*

**GÍ:** Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Áslakur R. Petersen, Poul Henning Jacobsen, Magni Jarnskor, Zdzislaw Janik, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen

**KÍ:** Meinhard Joensen – Atli Danielsen, Símun Waag Høgnesen, Jan Andreasen – Hjalgrím Elttør, Jan Joensen, Ove Nysted, Fríðin Ziskason, Símun Joensen – Alexander Djordjevic, Allan Joensen

# Claus gjørt sáttmála við Bradford

**Claus Bech Jørgensen fer komandi tvey árini at spæla fyri enska 1. deildarfelagið Bradford**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Fótbóltsspælarin Claus Bech Jørgensen, sum hevur føroyska mammu, hevur gjørt tvey ára sáttmála við enska 1. deildarfelagið Bradford.

Felagið spældi farna kappingarár í bestu ensku deildini, Premier League, men flutti niður í næstbestu deildina.

Claus Bech Jørgensen hevur farnu tvey árini spælt fyri 2. deildarfelagið Bournemouth, og har hevur tað gingið honum so væl, at hann fleiri ferðir hevur verið upp á tal hjá feløgum, sum spæla í hægru ensku deildunum.

Í summarsteðginum sendi umboðsmaður hansara skriv til fleiri feløg, har hann greiddi frá, at sáttmálin hjá Claus við Bournemouth gekk út í summar. Hetta fekk fleiri feløg at ressast, og eitt teirra var Bradford.

- Av teimum feløgunum, sum hava víst mær áhuga seinastu tíðina, er Bradford avgjørt mest áhugaverda felagið, og eg eri fegin um at hava gjørt sáttmála við felagið, sigur Claus Bech Jørgensen við donsku internettænastuna, bold.dk.

### Nýggj avbjóðing

Claus tók sjálvur stigið frá donskum fótbólti til enskan fótbólt fyri tveimum árum síðani.

Hann førdi seg fram í Onglandi, og Bournemouth bjóðaði spælaranum, sum tá spældi fyri AC Horsens, til royndarvenjingar.

Hetta gekk so mikið væl, at Bournemouth bjóðaði Claus enn eitt ára sáttmála. Hesin sáttmálin varð longdur við einum ári í fjør. Bournemouth hevur seinastu vikurnar roynt at fingið Claus at halda fram í felagnum, men hann hevur havt hug at royna seg í einum størri felag.

Hendan møguleikan hevur hann fingið í Bradford, sum skal royna at vinna sær plássið aftur í Premier League.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Landsliðsspælararnir hjá B68 settu HB upp á pláss

**Avrikið hjá HB boðaði frá, at teir ikki komu á botn, áðrenn landskappingin fór í summarfrí**

Sólin sá ikki, men summarveðrið var heilt fínt á Svangaskarði sunnudagin. Um nógvu HB viðhaldsfólkini, sum nýttu høvið til sunnudagsútferð í Eysturoynna, ikki kendu seg styrkt og stimbrað av veðrinum, soleiðis sum tað er í Føroyum ímillum søkurnar, so er tað ikki so nógv at siga til tað. Í myndatalu hekk eitt myrkt skýggj omanyvir teimum, tá teir komu til Toftir, og tá teir fóru avstað aftur mundi tað næstan kennast sum, at toran ætlaði sær at slága niður.

Tað man vera langt síðani, at HB hevur staðið fyri so ússaligum avriki á Toftum, sum tí teir sýndu í 2. hálvleiki sunnudagin. Hugburðurin var so jánkasligur, at tað tóktist sum um alt liðið sum tað var í steðginum hevði avrátt sinniliga at fara í summarfrí.

Eftiransingarnar vóru vánaligar, og ferð eftir ferð fingu toftamenn loyvi at draga nógvar metrar við bóltinum. Tá HB hevði bóltin, fluttu spælararnir seg lítið fyri bólthaldaranum, persónligu mistøkini vóru serliga mong, og um tað onkra ferðina eydnaðist at koma ígjøgnum í høgra borði, so vóru innleggini sera óneyv. Einar tvær ferðir tóktist tað sum um spenningur kanska skuldi spyrjast burturúr í B68 brotsteiginum, men í 2. hálvleiki hevði HB ongan rættuligan málmøguleika.

Sammett við tíðliga á árinum var tað mest merkisvert, at Rúni Nolsøe var so lítið sentralur, og at dynamisku renningarnar hjá Rógva Jacobsen vóru fullkomuliga burtur.

Hóast lítið sannførandi avrikið hjá mótstøðumonnunum, so gekk tað long tíð, áðrenn B68 fekk mál, og dysturin harvið var avgjørdur. Ion Geolgau royndi við trimum útskiftingum at fáa sítt lið at taka uppgávuna í størri álvara, men heldur ikki Rói Árting, Bárður Mortansson og Pætur Dam Jacobsen megnaðu at hótta B68.

### Lyklaspælarar

B68 hevur ofta víst meiri sannførandi spæl, enn teir gjørdu hesa ferð. Men hjá teimum flestu teirra var hugburðurin væl betri, enn hann var hjá mótstøðumonnunum. At sigurin var so tepur mundi komast av, at einir tveir spælarar longu undan dystarbyrjan tóktust vera fullkomuliga farnir í summarfrí.

Mest eyðsýndu B68 menninir vóru teir tríggir landsliðsmenninir. Miðverjan var stinn, og serliga Hans Fróði Hansen, sum hesa ferð var afturat, var sannførandi. Ikki minst í 2. hálvleiki, tá HB sendi nógvar langar og høgar bóltar fram ímóti brotsteiginum, støð Hans Fróði sera sterkur í myndini. Hann vann allar luftbóltarnar, og hann var avgjørdur í taklingunum.

Á miðvøllinum reikaði Øssur Hansen nógv, hann var illa ansaður, hann hevði ofta bóltin, og hann slapp sær oftast skilagott av við hann. Fróði Benjaminsen var mest avgerandi spælarin. Hann vann nógvar luftbóltar, hann megnaði at temja og spæla skilagott víðari, og hann hevði ongar trupulleikar at sneiða bæði tveir og tríggjar spælarar av, tá hann bjóðaði av ein ímóti einum.



*Fróði Benjaminsen spældi ein góðan dyst sunnudagin*

John Heri Dam kom ofta framvið í vinstra borði, meðan tað var meiri tamt í hinum borðinum, har Arnold Joensen tóktist hava fingið boð um at liggja aftarlaga á vøllinum, meðan Marlon Jorge skuldi royna at taka sær av frammrættaða partinum.

### Mál og møguleikar

B68 legði sera bragdliga fyri. Teir vóru ágangandi fyrstu løtuna, teir høvdu fleiri møguleikar, og teir komu á odda, tá bara fimm minuttir vóru farnir. Fróði Benjaminsen setti ferð á, og væl uttanfyri brotsteigin smekkaði hann til. HB verjan og málverjin tóktust ikki rokna við hesum, og bólturin streyk í málið.

Sum fyrra umfarið leið, javnaðist spælið. HB hevði sína bestu løtu, og teir javnaðu miðskeiðis í umfarinum. Allan Mørkøre, sum hesa ferð mannaði álopið saman við Jón Róa Jacobsen, gjørdist púra leysur næstan á baklinjuni í høgru, og úr stuttari fjarstøðu smekkaði hann framvið nærra stólpanum og í málið.

Sigursmálið skoraði Fróði Benjaminsen í 58. minutti. Í besta B68 álopinum í øllum dystinum ferðaðist bólturin frá aftarlaga í høgra borði, fram og tvørturum til Øssur Hansen, sum úr vinstru fekk loyvi at draga langt, áðrenn hann slepti til Fróða Benjaminsen, sum aftur fekk loyvi at draga langt, áðrenn hann – staddur mitt fyri og fimtan metrar úr málinum – smekkaði til. Bólturin tók í ein havnarmann, áðrenn hann fór um strikuna, og harvið var B68 á odda.

Síðsta hálva tíman sá tað í løtum út til, at B68 hevði hug at leggja seg aftur á vøllin fyri at verja leiðsluna. Men HB hevði sera lítla tyngd í álopspartinum, og sum tíðin leið høvdu toftamenn fleiri møguleikar at økja um leiðsluna. Einar tríggjar ferðir komu teir til baklinjuna og spældu tvørt frá, men teir fingu ikki fleiri mál. At tað ikki eydnaðist, leggja teir nú neyvan so nógv í. Teir vunnu og fingu samband við HB. Havnarliðið tóktist vera í djúpum leikligum aldudali, og tað mundi koma væl við hjá bæði spælarum og venjara, at ein stuttur summarsteðgur nú er tað fyrsta á skránni.

**B68:** Magnus E. Poulsen – Oleif Joensen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira – Arnold Joensen, Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

**HB:** Bárður Johannesen – Vagnur Mohr Mortensen, Jóhannis Joensen, Eyðfinn Fjalsbak, Janus M. Joensen – Hallur Joensen, Rúni Nolsøe, Bjarni Jørgensen, Rógvi Jacobsen – Allan Mørkøre, Jón Rói Jacobsen

# KÍ-kvinnurnar skulu til Finlands

**KÍ skal spæla móti liðum úr Finlandi, Italia og Eysturríki í fyrstu europeisku kappingini fyri meistaralið, sum UEFA skipar fyri**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Fríggjadagin var lutakast til fyrstu meistarakappingina fyri kvinnulið, sum UEFA skipar fyri. Føroysku meistararnir KÍ vóru við í lutakastinum, og lutakastið lagaði tað soleiðis, at tær skulu til Finlands at spæla.

Kappingin verður skipað við innleiðandi bólkaspølum, og KÍ skal spæla ímóti HJK Helsinki úr Finlandi, Torres FS úr Italia og USC Landhaus úr Eysturríki. Kappingin verður hildin í Helsinki í september mánaði.

KÍ-kvinnurnar sleppa tí í øllum førum at spæla tríggjar europeiskar dystir, og um tað gongst teimum væl kunnu tær halda fram í kappingini. Vinnarin av bólkaspælinum kemur víðari.

### Fyrstu ferð

Hetta er fyrstu ferð, at europeiska fótbóltssamgongan, UEFA, skipar fyri meistarakappingina fyri kvinnulið. Tann stóra Champions League fyri menn er tiltikin, men nú tekur UEFA fyrstu stigini saman við kvinnunum.

Øll limalondini hjá UEFA eru boðin við til kappingina, og samlagt fara 33 europeisk meistarafeløg at luttaka.

KÍ-kvinnurnar vunnu í farna kappingarári bæði meistaraskapin og steypakappingina, og tær fingu tí tilboðið um at tekna til kappingina. Endin var, at KÍ tók av tilboðnum, og kvinnurnar hava seinastu vikurnar skipa fyri ymsum tiltøkum fyri at fíggja ein part av luttøkuni.

Tað eru als ikki somu pengarnir í hesi kapping, sum tað er í kappingunum hjá monnunum, og tí kostar tað fitt av peningi at luttaka.

### Fáa royndir á Man

Hetta er fyrstu ferð at føroyskt kvinnulið í fótbólti er við í UEFA-kapping, men nakrir av KÍ-spælarunum vinna sær í hesum døgum altjóða royndir á Isle of Man, har kvinnulandsliðið í fótbólti er við.

Sunnudagin vunnu tær størsigur á vertunum av Man, og við 9 av teimum 11 málunum gjørdu áleypararnir hjá KÍ, Rannvá Andreasen og Malena Josephsen. Umframt tær báðar spældu tríggjar aðrar KÍ-kvinnur við í dystinum.

Í heimligu kappingini hevur KÍ staðið seg sera væl. Tær skulu spæla steypafinalu ímóti HB á ólavsøku, og í landskappingini hava tær vunnið so at siga hvørja ferð.

Stóra avbjóðingin skal liðum verður tó ivaleyst í september, tá europeisku dystirnir verða á skránni.